## Samtykt fíggjarætlanina

Runavíkar kommuna samtykti á fundi í gjárkvøldið fíggjarætlanina fyri 2010. Skattaprosentið verður 22%, og barnafrádrátturin verður 4.000 kr fyri hvørt barnið. Skattainntøkurnar eru mettar til 99 mió komandi ár, har av 2 mió í partafelagsskatti. Til raksturin eru avsettar 69 mió, og samlaðu íløgurnar verða góðar 13 milliónir. Størsta einstaka íløgan er 7 mió til 2 barnagarðar, sum verða bygdir á Skála og í Søldarfirði. Teir verða lidnir komandi summar. Harafturat verða íløgur gjørdar í skúla, vatnveiting, vegir, kloakkir og á havnaøkinum. Nettoskuldin hjá kommununi er, orsakað av lægri skattaintøku í ár, farin 5% upp um eina álíkning. Býráðið hevur sett sær fyri at fáa nettoskuldina niður um eina álíkning í 2010, sigur Magnus Rasmussen, borgarstjóri í Runavíkar Kommuna.

## Tornarósa í Sjónleikarhúsinum týsdagin



Farið verður nú undir fyrstu sýningarnar av Tornarósu í Sjónleikarhúsinum í Havn. Týsdagin 1. desembur verður premiera av føroysku uppsetingini av dansi- sjónleikinum Tornarósa í Sjónleikarhúsinum í Havn. Tað eru tær báðar, Elin á Rógvi og Jóna Kristin Thomsen,sum í felag skapa ta listaligu myndina. Við eru í alt 15 leikarar og dansarar. Atgongumerkjasølan byrjar mánadagin og fáast atgongumerkini á Kunningarstovuni og í Sjónleikarhúsinum 1 tíma undan sýning.

# Arbeiðsóhapp var kleyvarskapur

**Slík óhapp eiga ikki at koma fyri. Tað sigur Símun Hammer eftirlitsmaður hjá Arbeiðseftirlitinum um hendingina, tá ein maður varð sendur á sjógv á kajini í Havn, har hann arbeiddi við at loysa Smyril**

ÓHAPP

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*




*Seint hóskvøldið gekk ein maður uppi á einum enda, tá hann arbeiddi við at loysa Smyril í Havn. Endin varð strammaður, og maðurin datt á sjógv. Sambært keldum breyt maðurin millum annað óstbeinið*

Seint hóskvøldið varð ein maður sendur á sjógv, tá hann arbeiddi við at loysa Smyril av havnini í Havn.

Tað var ein misskiljing millum mennirnar umborð og menninar uppi á landi, sum hevði við sær, at ein maður datt á sjógv, tá ein endi strammaðist, so maðurin datt á sjógv og fekk skaða.

– Hatta er eitt samanfall av nógvum óhepnum umstøðum. Ein endi strammaðist upp undir hann, tá hann fór gangandi eftir honum, og slíkt eigur ikki at koma fyri. Vanliga verða slíkir endar ikki strammaðir so skjótt, og tað er heldur ikki vanligt at ganga uppi á endunum, sigur Símun Hammer, eftirlitismaður, sum hevur kannað umstøðurnar kring óhappið við manninum, sum datt niður ímillum Smyril og molan í Havn seint hóskvøldið.

### Ongar avleiðingar

Eftirlitismaðurin er sannførdur um, at júst hetta óhappið ongar avleiðingar fær fyri mannagongdirnar, tí hetta óhappið var sera ósannlíkt at henda.

– Ljósviðurskiftini vóru ikki í lagið, men tað verður arbeitt við tí í løtuni, so eg dugi ikki at síggja, at hetta kann fáa avleiðingar fyri mannagongdir, sigur Símun Hammer.

Eftirlitismaðurin er eisini sannførdur um, at eitt slíkt óhapp ikki fer at koma fyri aftur, tí hetta er so øgiliga ósannlíkt at fara at henda aftur.

– Hetta burdi ikki hent. Hetta er ikki eitt hendiligt óhapp, og eg dugi illa at ímynda mær, at slíkt hendir aftur, heldur Símun Hammer.

### Óhappið

Sjálvt óhappið hevði við sær, at maðurin varð sendur fyri borð og breyt sambært keldum óstbeinið.

Ein starvsfelagi var tó skjótur at fara eftir manninum, sum skjótt varð fluttur á Landssjukrahúsið, sum staðfesti, at maðurin altso hevði brotið óstbeinið.

Fríggjadagin vildi sjúkrahúsið ikki útskriva mannin.

# Jóla- og familjukonsert í Norðurlandahúsinum



**Jóla- og familjukonsert í Norðurlandahúsinum sunnudagin 6. desember klokkan 1400 og 1700.**

Eins og undanfarin ár fer Føroya Symfoniorkestur at hava eina familjukonsert nú undan jólum við ungum solistum og syngjandi børnum. Tað vera tvær konsertir, báðar í Norðurlandahúsinum sunnudagin 6. desember klokkan 1400 og klokkan 1700.

Umframt at jólasangir verða sungnir av børnum úr Kóri Glyvra kirkju, Tórshavnar Musikkskúla, Eystursúkúlanum, Vestmanna skúla og Tórshavnar Kommunuskúla, so fer Oluf Dam at spæla kenda satsin úr klaverkonsert nr. 21, Kochel 467 av W. A. Mozart, betur kendur sum Elvira Madigan. Hesin satsurin fekk hetta heitið, tá tónleikurin varð brúktur í svenska filminum Elvira Madigan frá 1967 um syrgjuligu ástarsøguna um Elviru, sum var línudansari í sirkusinum hjá pápa sínum, og dragonløjnatntin Sixten Sparre. Tey endaðu sínar dagar á donsku oynni Tåsinge í 1889.

Unga songgentan Jensia Højgaard Dam syngur vakra sangin "Walking in the Air" úr The Snowman, sum skaldið Alexander Kristiansen hevur føroyskað til "Vit sveima løtt í ský" eftir bretska tónasetaran Hovard Blake. Hetta verkið, The Snowman, verður framført av symfoniorkestrinum við Anfinni Heinesen, sjónleikara, sum frásøgumanni.

Sum vant, so endar tónleikaløtan við at vit øll í felag syngja Føgur er foldin.

Atgongumerkini kosta 75 krónur.